gult cyan magenta svart

Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesi› eisini Ítróttasosialin á alnótini

www.sosialurin.fo

Jon Hestoy yvirdómari í EM

Einasti føroyingurin, sum hevur tiki› lut í HM kappingum, hevur veri› í Finnlandi og hildi› skil á maraton kappingini

Ta› eru ivaleyst fleiri, sum hava fylgt vi› í EM kappingini í svimjing, sum hesa seinastu vikuna hevur veri› í Finnlandi. Eurosport hevur sent, og onkur hevur kanska hugsa› vi› sær sjálvum, at í sovornum kappingum hava føroyingar einki at gera.

Eingir føroyingar hava tiki› lut í kappingunum. Men ein føroyingur hevur havt t‡›andi leiklut í onkrum av kappingunum. Talan er um Jon Hestoy, sum – um vit í hesum sambandinum ikki rokna› ÍSB svimjararnar uppí – er tann føroyingurin, i› hevur framt størstu altjó›a svimjibrøgdini.

Jon Hestoy er higartil einasti føroyingurin, sum hevur umbo›a› okkara lítla land í einari HM kapping í svimjing. Ta› gjørdi hann longu í 1982, tá hann var vi› í 200 metra firvalda kappingini og 400 metra blanda›u kappingini. Ta fer›ina var HM kappingin í Equador.

Størsta avbjó›ingin

Í kappingini í Finnlandi hevur Jon Hestoy veri› ein av dómarunum. Ta›, sum mest hevur veri› at sæ› til í sjónvarpinum, hevur veri› kappingarnar, i› ganga fyri seg í 50 metra hylinum. Harafturat hevur eitt sindur veri› av útlopi og synkronsvimjing.

Jon Hestoy hevur veri› dómari í tí, sum teir kalla maratoin svimjing. Talan er um f‡ra kappingar – menn á 5 og 25 kilometra teininum og kvinnur á 5 og 25 kilometra teininum. Hesar kappingarnar eru ikki so nógv kendar í Europa, sum tær eru t.d. í Su›uramerika og Afrika, har ta› meiri enn so kemur fyri, at fleiri enn hálvt hundra› túsund ásko›arar savnast til stóru meistarakappingarnar.

Hesa fer› hava maratonkappingarnar veri› í Espo uttanfyri Helsingfors í tí vatninum, sum eitur Solvalla.

Jon var í Finnlandi frá t‡sdegnum 27. juni og fram til mánadagin 4. juli. Størstu avbjó›ingina fekk hann, tá hann tann tri›ja av f‡ra kappingardøgum var yvirdómari í 25 kilometra kappingini fyri menn. Henda kappingin ver›ur í hesum høpinum mett sum tann størsta.

Jon Hestoy hevur mangan veri› yvirdómari í FM kappingum og í Oyggjaleikunum. Í prinsippinum heldur hann ikki, at ta› var so nógv ø›rvísi at hava ábyrgdina av maratonkappingini, men alíkavæl:

– Umstø›urnar gera, at talan er um nógvar reglar at halda seg til, sum ikki eru galdandi í vanligari svimjing, um vit kunnu kalla ta› solei›is. Undan fyrsta kappingardegnum funda›ust vit nógv og leingi.

Hvat var so uppgávan hjá tær?

– Tí›in hjá teimum fremstu í 25 kilometra kappingini var fimm tímar og fimm minuttir. Í seks tímar stó› eg á brúnni umbor› á yvirdómarabátinum vi› einum walkie talkie og eygleiddi svimjararnar og hjálparbátarnar, sum fylgdu vi› hvørjum einstøkum luttakara. Ta› var› tosa› vi› venjarar og eftirlitsmenn, og um serlig vi›urskifti gjørdu seg galdandi, so loysti hjálpardómarin meg av á brúnni, me›an eg fór at seta meg inn í serstaka spurningin og upp á standandi fót at taka stø›u út frá reglunum.

Kolldømdi tú nakran svimjara?

– Luttakararnir vóru sera medvitandi um reglarnar, so ta› var ikki ney›ugt. Í tí eina førinum gav eg einum svimjara eina ávaring. Hana fekk hann fyri at leggja seg í kjalarvørrin hjá einum av kappingarneytunum. Hetta er vanligt í t.d. súkklukappingum, og tá teir á skíum kappast á longu teinunum, men í maraton svimjingini er hetta ikki loyvt.

Hvør er sektin, um ein svimjari freistast til á henda hátt at lætta um?

– Í fyrstu atløgu ver›ur ein ávaring givin. Um hon ikki hjálpir, so skal svimjarin bí›a í ein minutt, á›renn hann sleppur at halda fram.

Nevndararbei›i›

Á Skálafjar›arstevnuni tók Jon Hestoy lut í svimjingini av Strondum og yvir til Runavíkar, so hann hev›i kent eitt vet á egnum kroppi, hvat ta› snú›i seg um, tá hann hev›i eftirlit vi› teimum 22 luttakarunum í Solvalla vatninum:

– Hetta er ein ógvuliga krevjandi kapping. Teir drekka og kanska eta eina banan ella okkurt sovor›i› tvær fer›ir um tíman. Ta› er ikki óvanligt, at ta› ørar fyri svimjarunum, og at teir hava hug at sp‡ggja. Um teir sp‡ggja, so skulu teir gevast. Ta› siga ásetingarnar.

Hvussu ber ta› til, at tú ert komin uppí EM kappingina?

– Í fyrraári› gjørdist eg limur í teknisku nevndini fyri svimjing í fríum vatni. Ta› vóru nor›urlendsku svimjisambondini, sum innstilla›u meg til europeiska svimjisambandi›, LEN, og ta› var LEN, sum sendi bo› eftir mær, grei›ir Jon Hestoy frá.

EM í svimjing var í fjør í Turkalandi. Tá var Jon Hestoy eisini til sta›ar. Kappingin er vanliga anna› hvørt ár. At ta› var› kappast bæ›i í fjør og í ár kemst av, at teir hava broytt kappingina frá at vera ólíkaár og til at vera líka ár.

Er hetta spennandi arbei›i?

– Sum gamal svimjari ert tú bitin av umhvørvinum. Ta› mest áhugaverda er at hitta nevndarlimirnar a›ra sta›ni frá. Teir hava tiki› lut í somu kappingunum, sm tú sjálvur hevur veri› vi› í, og so ver›ur hvør søguligur smálutur vendur og snara›ur. Ta› er bara heilt stuttligt.

jh

Uni ger um seg

Landsli›sma›urin í Akranesi er komin fyri seg aftur, og ÍBV sendi Leiftur úr steypakappingini

Ta› gongur av skri›uni hjá teimum f‡ra føroyingunum á Ólafsfir›i. Í fyrrakvøldi› hev›i Leiftur, sum er ni›ast í landskappingini, vitjan av Allani Mørkøre og hinum í ÍBV. Vestmannaoyingarnir vunnu 4–2. Teir halda fram í áttandaparts finaluni í steypakappingini, sum í Íslandi eitur CocaCola kappingin.

Eingin føroyingur var millum málskjúttarnar. ÍBV var á odda 4–0, á›renn Leiftur, sum nú fer at savna alla orkuna um at sleppa av ni›urflytingarplássinum, svara›i aftur.

Uni Arge hevur gingi› ótolin og bí›a eftir, at ska›in í økslini skuldi hvørva. Nú er Arge ma›urin komin fyri seg aftur, og í fyrrakvøldi› gav hann fyrstu ábendingarnar um, at teir í Akranesi kunnu rokna vi›, at máltevi› framvegis er, sum ta› hevur veri›.

ÍA vann 4–1 á heimavølli ímóti Dalvík, og í 63. minutti var Uni Arge á rætta sta›num, tá hann vi› gó›um stútara skora›i til 3–1.

Ta› gongur væl hjá Pálli Gu›laugsson og Keflavík. Fyrr í vikuni sendu teir KR, sum í fjør vann bæ›i meistaraskapin og steypakappingina, úr steypakappingini. Keflavík vann 2–1.

Pól Thorsteinsson spælir vi› Vali í næstbestu deildini. Teir eru eisini komnir í áttandaparts finaluna. Men ta› var strevi› hjá Póli og teimum. Teir spældu ímóti Víkingi. Eftir vanliga leiktí› stó› á jøvnum 1–1. So var ney›ugt at spæla tvær fer›ir fimtan minuttir, og tá hev›i Valur vunni› 3–2.

Brei›ablik vann eftir longda leiktí› á útivølli 1–0 á Sindri, og Grindavík vann á útivølli í Reykjavík 2–0 á Fram. FH er toppli› í næstbestu deildini. Í steypakappingini gongur eisini væl hjá teimum. Mikukvøldi› vunnu teir 2–0 á Stjørnuni.

jh



Uni Arge er nú aftur til dystin fús

HM ver›ur í T‡skalandi

Bechenbauer og hansara menn sn‡ttu seinnaparrtin í gjár Su›urafrika og su›urafrikanararnar, men munurin var so lítil, sum hann kundi vera

Klokkan eitt seinnapartin í gjár almannakunngjørdi forma›urin í altjó›a fótbóltssamgonguni, FIFA, Sepp Blatter, at HM endaspæli› í 2006 ver›ur í T‡skalandi. Vesturt‡skaland var í 1974 vertur og vann kappingina, og nú skal T‡skaland, sum fyri tíggju árum sí›ani var› endursavna›, h‡sa endaspælinum.

24 limir eru í a›alnevndini hjá FIFA, og ta› var tætt, tá teir atkvøddu. Tólv atkvøddu fyri T‡skalandi, ellivu atkvøddu fyri Su›urafrika, og ein atkvø›a var blonk.

F‡ra tjó›ir bjó›a›u seg fram, og bæ›i onglendingar og su›urafrikanarar vóru sera vónbrotnir í gjár.

Ta› var ney›ugt at atkvø›a tríggjar fer›ir fyrrapartin í gjár. Í fyrstu atkvø›ugrei›slu datt Marokko burturúr, í a›ru atkvø›ugrei›slu datt Ongland burturúr, og so stó› vali› millum Su›urafrika og T‡skaland.

At T‡skaland ver›ur vertur í 2006 ger, at endaspæli› í 2010 ivaleyst ver›ur í onkrum ø›rum heimsparti. Tí vóru onglendingarnir serliga vónbrotnir. Teir fáa tískil í fyrsta lagi› møguleikan í 2014, og ta› tykist at vera langt burtur.

Su›urafrikanararnir, sum m.a. hava brúkt Nelson Mandela at sannføra teir, sum sita vi› valdinum um, at ta› var upplagt, at endaspæli› fyri fyrstu fer› skuldi vera í Afrika, hildu seg hava gó›an møguleika, tá Marokko og Ongland vóru úti av spælinum. Tí vóru teir serliga vónbrotnir, tá Sepp Blatter fimm minuttir yvir eitt í gjár á tí›indafundi í Zurich, sum ta› var› hugt at kring allan heimin, kunngjørdi, at T‡skaland fær hei›urin at h‡sa HM endaspælinum í 2006.

Harvi› vunnu Bechenbauer og hinir t‡skararnir enn eina fer›. Taki› hjá teimum ver›ur nú at endurskapa t‡ska landsli›i›, sum hevur sta›i› seg illa seinnu árini.

Sepp Blatter seg›i, at hetta var fyrsta fer›in, at f‡ra tjó›ir vóru vi› í endaligu kappingini um at h‡sa endaspælinum, og hann undirstrika›i, at umstø›urnar í øllum londunum vóru gó›ar. Men bara ein vinnari var, og sum so mangan á›ur, so vóru ta› t‡skararnir, sum stó›u vi› sigrinum.

jh

Føroyska landsli›i› fer at strí›ast fyri at sleppa vi› til HM endaspæli› m ver›ur i Tyskalandi i 2006

Unglingarnir bodnir til Køln í bundesliguni

Bæ›i í fyrrakvøldi› og fyrrapartin í gjár vunnu føroysku u–17 dreingirnir í Leipzig, og ta› hevur vakt ans a›ra sta›ni í T‡skalandi

Seinnapartin í gjár skuldi føroyska u–17 landsli›i› í fótbólti spæla fjór›ingsfinlu í kappingini, sum í hesi vikuni er í Leipzig í T‡skalandi í sambandi vi›, at t‡ska fótbóltssambandi› hátí›arheldur eitt hundra› ára stovningardagin.

Venjarin Jógvan Martin Olsen var á middegi í gjár væl nøgdur vi›, at teir í áttandaparts finaluni fyrrapartin í gjár høvdu vunni›, men hann stúrdi fyri dystinum seinnapartin. Føroysku unglingarnir høvdu bara gó›ar tríggjar tímar at hvíla seg í, me›an slovakisku mótstø›umenninir høvdu gjørt burtur av sær so miki› tí›liga í gjáramorgunin, at teir høvdu tríggjar tímar meiri at hvíla seg í, og ta› er ikki so líti›.

– Mótstø›an hevur ikki veri› so stór í øllum dystunum, men eg má siga, at sí›ani eg fór at fáast vi› unglingalandsli›ini fyrst í níti árunum, so hevur eingin árgangur sta›i› seg so væl og spælt so væl sumhesir dreingirnir. Teir vita, hvat ta› sn‡r seg um. Teir hava rætta hugbur›in, og teir hava sjálvsálit til úti í heiminum at gera nyttu burturúr evnunum og royndunum, sum teir hava, sta›festir venjarin.

Og ta› er ikki bara venjarin hjá føroysku u–17 dreingjunum, sum heldur, at hansara li› er áhugavert. Í fyrradagin setti ein av venjarunum hjá bundasligufelagnum Køln seg í samband vi› føroyska venjaran. Ørindini hjá fremmanda manninum vóru at fregnast, um føroyingarnir vóru áhuga›ir í mai komandi ár at taka lut í altjó›a kapping, sum f‡ra feløg skipa fyri, i› eru í bundesliguni, og sum eru í nánd av Køln.

– Teir bjó›a trimum fremmandum li›um at taka lut, og eftir at hava sæ› okkara dreingir helt hann ta› vera upp á sítt pláss at geva okkara li›i møguleikan. Um FSF ger av at taka av innbjó›ingini, so ver›ur hetta eitt veldugt høvi hjá ungu monnunum at vísa sínar fótbóltsdygdir, me›an umbo› fyri stórfeløg bæ›i í T‡skalandi og a›ra sta›ni hyggja at, heldur Jógvan Martin Olsen, sum ikki ivast í, at dreingirnir, sum sjálvandi hava ungdómsdreymin um at gerast yrkisspælarar, eru áhuga›ir at royna stóru avbjó›ingina.

Sigrarnir

I fyrrakvøldi› vann føroyska li›i› 4–0 ímóti einum li›i úr Croatia, sum kallast Kustosija. Stø›an eftir tann fyrra hálva tíman var 2–0.

– Í tí dystinum s‡ndi okkara li› besta spæli› higartil í kappingini. Teir vóru fullir í sjálvsáliti›, teir vóru væl skipa›ir, og teir s‡ndu gott hugflog bæ›i í verjupartinum og í álopspartinum, sigur Jógvan Martin Olsen.

Vongverjin Áki Leitisstein Hansen setti hol á í 10. minutti. Skotroynd frá Símuni Joensen var› blokera›, bólturin støkk upp í luftina og dygst uttanvert brotsteigarmarki› royndi NSÍ ma›urin seg vi› heilfluktara, og ta› sang í netinum. Í 26. minutti økti Hjalgrím Elttør. Hann spældi eitt tvey vi› Fró›a Jóanesarson og kom leysur. Í 37. minutti økti Fró›i Jóanesarson til 3–0. Uppspæli› var í høgru, og NSÍ álopsma›urin var fyrstur á flata innlegginum hjá Jann Inga Petersen.

Álopsma›urin úr HB, Bjarni Jørgensen, skora›i sí›sta máli› upp á brotsspark, eftir at mótstø›umenninir høvdu felt hann.

Fyrrapartin í gjár æt mótstø›uli›i› NK CELIK ZENICA úr Bosnia. Teir vóru steerkir og skjótir, og ta› undrar føroyingarnar, um hesir ikki vóru eldri, enn føroysku spælararnir.

– Teir takla›u so ta› sang eftir í, og í 1. hálvleiki vóru okkara dreingir eitt sindur kroystir. Men eftir ste›gin var eingin ivi um, hvat var betra li›i›. Vit vunnu 2–0, og Bjarni Jørgensen skora›i bæ›i málini. Í 10. minutti tók ein av verjuspælarunum bóltin vi› arminum, eftir at uppspæl í høgru millum Gilla Haraldsen og Jann Inga Petersen var enda› vi› innleggi frá tí seinni nevnda. Í 57. minutti var Bjarni á rætta sta›num og setti fótin undir innlegg frá baklinjuni í vinstru. Símun Joensen sendi Hjalgrím Elttør avsta›, hann sneiddi tveir av sær, kom til baklinjuna og leg›i so út frá, grei›ir Jógvan Martin Olsen frá úr Leipzig.

Li›i›

Teir fyrstu ellivu vóru teir somu bæ›i í fyrrakvøldi› og fyrrapartin í gjár: Pól Næs Joensen, B36 – Jann Ingi Petersen, B68, Vagnur Mohr Mortensen, HB, Jón Rói Jacobsen, HB, Áki Leitisstein Hansen, NSÍ – Gilli Haraldsen, Haderslev, Hjalgrím Elttør, KÍ, Símun Joensen, li›forma›ur, KÍ, Elfinn Ørvarodd, FS Vágar – Bjarni Jørgensen, HB, Fró›i Jóanesarson, NSÍ.

í fyrrakvøldi› fór Símun Joensen, sum hevur ein lítlan løst í fótabla›num at dragast vi›, út í 40. minutti, og Atli Danielsen, KÍ, loysti hann av. Í 45. minutti kom Arnfinn í Bartalsstovu, GÍ, í máli› í sta›in fyri Pól Næs Joensen, og í 48. minutti kom Hanus Eliasen, ÍF, í álopi› í sta›in fyri Fró›a Jóanesarson.

Fyrrapartin í gjár fór Elfinn Ørvarodd út í 50. minutti, tá Atli Danielsen, KÌ, kom inn. Í 52. minutti kom Bár›ur Christiansen, HB, á vongverjan í vinstru fyri Áka L. Hansen, og í 55. minutti fór tvífaldi málskjúttin, Bjarni Jørgensen, út, og Hanus Eliasen, ÍF, kom inn.

Jógvan Martin Olsen heldur, at 1983 árgangurin er sjáldsama gó›ur, og hann vísir eisini á, at teir, sum eru føddir í 1984, og sum hava fingi› møguleikan hesa fer›, hava sta›i› seg sera væl. Og so skulu vit minnast til, at Kristian á Lakjuni, sum er fastur ma›ur á besta li›num hjá KÍ, ikki er vi›, tí hann plágast av ska›a.

– Í Leipzig undrast tey á, at ta› í Føroyum, har ta› eru 45 túsund fólk, kunnu vera so nógvir hugaligir og gó›ir fótbóltsspælarar í tveimum árgangum. Í Leipzig økinum búgva hálv onnur millión, og øll li›ini, sum teir høvdu vi› í kappingini, eru langt sí›ani send til hús, sta›festir føroyski venjarin, og ta› sær út til, at tey a›ra sta›ni í T‡skalandi halda ta› sama sum hann. Fyri ungu menninar ver›ur møguliga fer›in til Køln komandi ár ein stór gularót. Ta› er einki at ivast í!

Uttan mun til hvussu ta› gekk seinnapartin í gjár, so kemur føroyska li›i› aftur til Føroya í morgin. Semifinlurnar og finalan ver›a spæld í dag.

jh

gult cyan magenta svart